*»Man skal tora at gera feilir, tí annars vinnur man ikki flogbóltsdystir«*

*Ella Joensen, KÍF*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341840

ÍTRÓTTUR

# Royn vil upp í VB/Sumba

**Nevndirnar í feløgunum hava tosað saman, og um ikki so langa tíð skulu limirnir í Royn taka støðu til, hvørt tey vilja gerast partur av VB/Sumba-samstarvinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað er vónleyst at reka fýra feløg í Suðuroynni, heldur Jonhard Thomsen, formaður í Royn*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Umframt setanina av Tomislav Sivic, so vórðu spælararnir hjá VB/Sumba í gjár kunnaðir um, at tað í løtuni verður arbeitt við ætlanum um at fáa Royn upp í samstarvið kring VB/Sumba. Eitt samstarv, sum soleiðis kann fevna um trý av teimum fýra suðuroyarfeløgunum.

Og stendur tað til nevndina í Royn, so er eingin ivi.

- Hetta er væl ein staðfesting av, at grundarlagið er ov tunt til at reka eitt felag sum Royn. Stóri trupulleikin í Suðuroynni er, at flestu spælararnir fara norðanfjørðs, tá teir eru eini 20 ár, og tí er ikki grundarlag fyri fýra feløgum. Sammeta vit við eitt nú Norðoyggjar, so hava tey eitt felag til alt økið, og tí er tað púra burturvið, um vit skulu reka fýra feløg her suðuri, sigur Jonhard Thomsen, formaður í Royn.

Tí valdi Royn at taka pláss við samráðingarborðið, tá VB/Sumba beyð teimum at egrast partur av samstarvinum.

- Vit hava verið á kunnandi fundi, og mikukvøldið høvdu vit umboð á spælarafundinum í Vági. Væntandi verður nýggjur fundur millum nevndirnar um stutta tíð, og so verður tað upp til limirnar at taka endaligu støðu í málinumm, sigur Jonhard.

Men hví hevur Royn valt at fara í samstarv við VB/Sumba. Landafrøðiliga vildi tað væl verið lættari, sum samstarvað varð við TB?

- Tað eru vágbingar, sum hava boðið okkum at tosa um samstarv, og so tosa vit við teir. Vit samskiftu við TB í fjør, men tá okkara limir skuldu taka støðu til málið, komu boð av Tvøroyari um, at hetta kortini ikki kundi gerast. Síðani hava vit einki hoyrt frá TB, og tí er hetta ikki nakað, sum vit hava nýtt stórvegis av orku uppá, sigur Royn-formaðurin.

Kyndil-Stjørnan 19-27 (7-13):

# Stjørnan fótaði sær væl

**Við einum tryggum útisigri á Kyndli vann Stjørnan seg aftur á oddasessin**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Tapið móti VB skuldi vaskast burtur. Tað vóru greiðu boðini frá Stjørnuni, tá tær mikukvøldið fóru til Havnar at spæla móti Kyndli, og tann setningin røktu tær væl og virðiliga.

Í mun til so nógvar aðrar dystir hjá Stjørnuni í ár, so vóru spælararnir hesa ferð tendraðar frá fyrsta bríksli. Verjan fekst alt fyri eitt at koyra, og tí hevði Kyndil sera trupult við at gera nakað sum helst fyrstu longu løtuna. Verjuspælið hjá Kyndli var hinvegin heldur ikki heilt av vegnum, men tá vertirnir bara skutu tvey mál fyrsta korterið, so byrjaði dysturin longu at koppa.

**Trý brotskøst á rað**

Stjørnan tóktist heldur ikki at vilja slaka nakað, hóast munurin ikki var heilt so eyðsýndur seinna korterið undan steðginum.

Eftir steðgin skuldi sigurin bara koyrast heim, og tað varð hann so eisini uttan stórvegis dikkedarir. At Kyndil á vegnum loyvdi sær at misnýta trý brotskøst innan fyri tveir minuttir, gjørdi ikki uppgávuna hjá Stjørnuna truplari, og sum dysturin leið, gjørdist spurningurin bara, hvørt talan skuldi gerast um veruligan stórsigur.

Tað gjørdist tað tó ikki. Heldur ikki hóast Kyndil seinastu løtuna gjørdi óvanliga nógv mistøk, tá møðin eisini fór at gera um seg. Men við áttu málum var eingin ivi um vinnaran, og tað

FAKTA

**Kyndil-Stjørnan 19-27 (7-13)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Lina Andriulyte 6(2), Ronja M. Mmikkelsen 4(1), Anja Heinadóttir 3, Jórun Ludvig 2, Barbara Egilstrøð 1, Jacklin Durhuus 1, Eydna Apol 1, Brynhild Klein 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 8(5), Durita Christophersen 7, Simona Petersen 3, Anna Kristina Samson 3, Joan Midjord Djordjevic 2, Hansa Mikkelsen 1(1), Una Olsen 1, Maria við Neyst 1, Annika Biskopstø 1
**Brotskøst:** Kyndil 7, Stjørnan 6
**Útvísingar:** Kyndil 2, Stjørnan 2
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

## Gylti skógvurin til HB

**Toppskjúttin í føroysku landskappingini tey bæði seinnu árini, Christian Høgni Jacobsen, skal komandi árið spæla við HB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið gjørdist tað so veruleiki, sum hevur ljóðað leingi. Toppskjúttin í føroyskum fótbólti tey bæði seinnu árini, Christian Høgni Jacobsen, skal komandi árið spæla við HB.

Hóast tað ikki hevur verið alment, so staðfesta álítandi keldur, at tað longu er nakað síðani, at avtalan millum partarnar varð gjørd. Christian Høgni hevði tó samstundis samband við okkurt danskt felag umframt Milton Keynes Dons í Onglandi, og fyrst skuldi greiða fáast á, hvørt hetta gav úrslit í einum uttanlandsævintýri.

Tað gjørdi tað ikki, og tí er Christian Høgni nú til reiðar at tørna út fyri meistararnar, sum longu nú tykjast hava ein ræðandi sterkan hóp undan komandi kappingarárinum.



*Mest skorandi spælarin tey bæði seinastu árini skal nú spæla í álopinum hjá mest skorandi liðnum*